# Viðtøkur

fyri

Ognarfelagið Lív

## I. Navn, heimstaður og endamál

§ 1

Felagsins navn er Ognarfelagið Lív f.v.a.á. (felag við avmarkaðari ábyrgd), raðnummar 115 í felagsskránni.fo, niðanfyri nevnt "felagið".

§ 2

Heimstaður felagsins er í Tórshavnar kommunu.

§ 3

Endamál felagsins er at eiga partapening í P/F Tryggingarfelagið LÍV, skrás.nr. 5367.

## II. Limirnir

§ 4

Allir tryggingartakarar og tryggjað sambært samlagstrygging hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV ella feløgum tess eru limir í felagnum.

Tryggingartakari og tryggjað sambært hesi grein eru øll tey, sum hava eitt tryggingarkundaforhold við eitt av feløgunum hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV hvønn tann 30.sept.

§ 5

Stk. 1. Limirnir í felagnum ábyrgdast ikki fyri skyldum felagsins.
Stk. 2. Limir hava ikki rætt til part av ogn felagsins, tá ið hesir fara út, eins og einki gjald verður kravt við innliman.

§ 6

Stk. 1. Allir limir hava rætt at møta á aðalfundinum og taka orðið har, men hava ikki atkvøðurætt.

Stk. 2. Luttøka á aðalfundinum er treytað av, at limurin í seinasta lagi 8 dagar frammanundan aðalfundinum til skrivstovuna hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV hevur boðað frá luttøku.

## III. Umboðsráð

§ 7

Stk. 1. Valt verður umboðsráð at taka avgerð felagsins vegna á aðalfundi felagsins. 35 umboðslimir verða valdir av og millum limirnar í felagnum. Val er fjórða hvørt ár og allir 35 standa fyri vali, galdandi fyri val til Umboðsráðsráðið aftaná 1. januar 2019.

Stk. 2. Fer umboðsráðslimur frá, tekur tann limur, sum var uppstillaður til seinasta umboðsráðsval og var næstur vali, sæti í umboðsráðnum fyri restina av valskeiðinum hjá viðkomandi, sum fór frá. Letur hetta seg ikki gera, verður farið fram samsvarandi § 9, stk. 6.

Stk. 3. Umboðsráðið tekur við virksemi sínum á fyrsta aðalfundi aftaná at valúrslitið hevur verið almannakunngjørt, sambært § 9, stk. 4.

## IV. Val av Umboðsráði

§ 8

Stk. 1. Valið fer fram eftir reglum sum Umboðsráðið hevur samtykt. Ásettar verða reglur um mannagongd fyri valinum, hvussu fráboðan av valevnum skal vera, og hvussu atkvøðugreiðslan fer fram.

Stk. 2. Umboðsráðið almannakunnger fráboðan um, nær val av umboðsráðslimum skal fara fram, í seinasta lagi 15. november árið fyri valið verður.

§ 9

Stk. 1. Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsráðslimur, skulu boða frá hesum innan tann 15. desember árið fyri at val verður. Uppskotið um valevni skal vera undirskrivað av í minsta lagi 5 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni til hvørt val, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Stk. 2. Um talið av valevnum er størri enn talið av umboðsráðslimum, ið standa fyri vali, verður tað almannakunngjørt sambært ásettu mannagongdini í seinasta lagi 20. desember.

Stk. 3. Stjórnin í P/F Tryggingarfelagnum LÍV ger úrslitið av valinum upp. Umboðini verða sett í røð eftir tali av atkvøðum. Stendur á jøvnum millum valevni, verður valið millum hesi avgjørt við lutakasti.

Stk. 4. Valúrslitið verður almannakunngjørt í teimum somu miðlunum, sum valið varð lýst í.

Stk. 5. Valið fellur burtur, um uppstillaðu valevnini ikki eru fleiri enn tey, sum standa fyri vali, og verða hesi at rokna sum vald.

Stk. 6. Eru færri valevni uppstillað enn veljast skulu sambært § 7, stk. 1, verða teir vantandi umboðsráðslimirnir valdir av umboðsráðnum. Hetta verður fyriskipað á fyrsta fundi í nýggja umboðsráðnum.

Uppskot til vantandi umboðsráðslimir verða sett undir skrivliga atkvøðugreiðslu undir einum, og kann hvør umboðsráðslimur greiða eina atkvøðu fyri einum valevni.

Stendur á jøvnum millum valevnini, tá ið valið er av, verður avgjørt við lutakasti, hvør verður valdur.

§ 10

Stk. 1. Valbær er øll, sum lúka tær vanligu treytirnar fyri atkvøðurætt, sbr. § 11.

Stk. 2. Eingin kann virka sum umboðsráðslimur, og skal leggja starv sítt sum umboðsráðslimur niður,, um viðkomandi hevur starv hjá virki, sum er kappingarneyti hjá tryggingarvirkseminum hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV og tess dótturfeløgum.

§ 11

Stk. 1. Atkvøðurætt hava øll, sum eru limir í felagnum og hava verið tað síðan tann seinasta 30. september fyri valið.

Stk. 2. Allir limir, ið hava atkvøðurætt, hava minst eina atkvøðu og í mesta lagi 8 atkvøður fyri allar teknaðar tryggingar.

Stk. 3. Limir við teknaðum tryggingum, har árliga tryggingargjaldið er minni enn 15.000 kr. hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar 15.000 kr. í árligum tryggingargjaldi herafturat, fær limurin 1 atkvøðu, og fyri hvørjar byrjaðar 150.000 kr. í samanspardum virði á tryggingunum við ársenda, hægri enn 150.000 kr., fær limurin 1 atkvøðu, upp til í alt 8 atkvøður.

§ 12

Stk. 1. Klaga um eitt hildið val verður latin stjórnini í P/F Tryggingarfelagið LÍV í seinasta lagi 14 dagar eftir, at valúrslitið er almannakunngjørt.

Stk. 2. Stjórnin í P/F Tryggingarfelagið LÍV sendir klaguna víðari til nývalda umboðsráðið, sum viðger klaguna saman við advokati og sendir pørtunum skrivliga, grundaða avgerð.

Stk. 3. Tekur umboðsráðið avgerð um umval, fyriskipar formansskapurin valið, og nýtir mannagongdina í kapittul IV til umvalið.

## V. Aðalfundurin

§ 13

Stk. 1. Aðalfundurin, sum verður skipaður av umboðsráðslimunum, er ovasti myndugleiki í felagnum og verður hildin á heimstaði felagsins. Uppskotsrætt til aðalfundin hava umboðsráðslimir.

Stk. 2. Í seinasta lagi 8 dagar frammanundan hvørjum aðalfundi skal dagsskrá, tey fullfíggjaðu uppskotini, umframt ársroknskapur verða løgd fyri limirnar á skrivstovu og heimasíðu felagsins.

§ 14

Stk. 1. Formansskapurin boðar til aðalfund við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan við skrivliga at venda sær til umboðsráðslimir á bústaði teirra og lýsing í einum ella fleiri miðlum.

Stk. 2. Um uppskot til broytingar av viðtøkum felagsins skulu viðgerast á aðalfundinum, skal høvuðsinnihaldið í uppskotinum verða lýst í innkallingini. Uppskot um viðtøkubroytingar, sum skulu viðgerast á aðalfundi, skulu verða felagnum í hendi fyri 15. februar.

§15

Stk. 1. Aðalfundurin verður stýrdur av einum av umboðsráðnum valdum fundarstjóra.

Stk. 2. Tað, sum fer fram á aðalfundinum, verður ført í gerðabók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum.

§16

Í seinasta lagi 14 dagar eftir aðalfundin, skal aðalfundargerðabókin ella ein váttað úrskrift av henni vera atkomulig á skrivstovu og heimasíðu felagsins.

§ 17

Vanligur ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári í seinasta lagi í apríl mánaði við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn formansskapsins um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av:
   i) grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar,
   ii) uppskot til hvussu møguligt avlop ella tap skal viðfarast,
   iii) samsýningar til umboðsráðslimir og formansskap aftaná val.
3. Val av formansskapi, t.e. val av formanni, næstformanni og kassameistara.
4. Val av einum tiltakslimi fyri formanskapin.
5. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
6. Val av tveimum limum í nevndina í P/f Tryggingarfelagið Lív, sum verða valdir fyri eitt tvey ára skeið forskotið, soleiðis at ein nevndarlimur stendur fyri vali hvørt ár.
7. Møgulig fráboðað uppskot.

§ 18

Stk. 1. Eykaaðalfundur verður hildin eftir avgerð frá einum aðalfundi, ella tá formaðurin, næstformaðurin ella grannskoðarin biður um hann.

Stk. 2. Afturat hesum kunnu í minsta lagi 1/3 av umboðsráðslimunum biðja um eykaaðalfund til viðgerð av einum serstøkum evni.

Stk. 3. Verður áheitan sett fram um at kalla inn til eykaaðalfundar, verður hesin at kalla inn í seinasta lagi 4 vikur eftir, at áheitan er latin felagnum.

§ 19

Stk. 1. Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta, tó soleiðis, at í minsta lagi helmingurin av umboðsráðslimunum eru til staðar, og hevur hvør umboðsráðslimur eina atkvøðu.

Stk. 2. Til at samtykkja uppskot til broytingar av viðtøkum felagsins, krevst tó, at í minsta lagi 2/3 av umboðsráðslimunum eru umboðaðir, og má viðtøka vera samtykt við minst 2/3 av greiddum atkvøðum.

Stk. 3. Til at samtykkja avtøku av felagum, krevst tó, at samtyktin er gjørd av tveimum ársaðalfundum við vanligum umboðsráðsvali ímillum, og skulu í minsta lagi 2/3 av umboðsráðslimunum vera møttir, og má viðtøka vera samtykt við minst 2/3 av greiddum atkvøðum á báðum fundunum.

Stk.4. Verður felagið avtikið verða ognir felagsins lutaðar limum felagsins samsvarandi teirra atkvøðutali, sum ásett í § 11, stk. 3.

Stk. 5. Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

## VI. Roknskapur og umsiting av peningi felagsins

§ 20

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

§ 21

Stk. 1. Umboðsráðið skal ansa eftir, at felagsins ogn er neyðturviliga umsitin og standa soleiðis, at hon er til mest gagn fyri felagið, og soleiðis, at felagið altíð kann halda sínar skyldur.

Stk. 2. Ársroknskapurin verður almannakunngjørdur, tá hesin er góðkendur av aðalfundinum.

§ 22

Formansskapurin teknar felagið. Til keyp og sølu av partapeningi í P/F Tryggingarfelagið LÍV krevst tó aðalfundarsamtykt.

Hesar viðtøkur fyri Ognarfelagið Lív eru samtyktar 23. apríl 2024 og koma í staðin fyri viðtøkur samtyktar seinast 15. apríl 2021.

Formanskapurin:

Lisa Frederiksberg, forkvinna

Eyðdis Ellendersen, næstforkvinna

Sofus Debes Johannesen, kassameistari

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi tann 23. apríl 2024.

Sum fundarstjóri:

Óla Jákup Kristoffersen, adv.